

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 08 - 2013

# Saudi-Arabia bjóðar Ruslandi loyniliga oljuavtalu

Saudi-Arabia hevur í loyndum bjóðað Ruslandi eina avtalu um eftirlit við heimsins oljumarknaði og eina tryggjan av russisku gasssáttmálunum, um so er, at landið steðgar stuðlinum til styrið í Sýrialandi. Tað skrivar bretska blaðið The Telegraph. Blaðið vsir til skjøl, sum eru likin út frá fundi millum Putin forseta og umboð fyri stýrið í Saudi Arabia. Latið okkum kanna, hvussu vit kunnu fáa pláss fyri eini felags russiskari og saudiarabiskari oljustrategi. Málið er at gera semju um ein oljuprís og eitt framleiðslustøði, sum heldur prísinum stabilan, segði Bandar bin Sultan, prinsur eftir fýra tímar langa fundin. Hann segði seg skilja væl stóra russiska áhugan fyri olju og gassi í Meðalhavinum, frá Ísrael til Kypros eins og týdningin av eini russiskari rørleiðing til Europa. Tað eru vit ikki sinnað til at kappast við russar um, segði prinsurin. Avtalan, sum var á borðinum, fevndi um eina alliansu millum OPEC og Rusland. Putin forseti hevur nevniliga leingi ynskt eitt globalt gasskartel. Saudiarabar hava eisini lovað russum at verja flotahavnina í Sýria, um Assad verður rikin frá. Eftir øllum at døma hevur russiski forsetin takkað nei til tilboðið. Hann sigur sambært blaðnum, at tað besta fyri Sýrialand er, at verandi stjórn heldur fram. Russar eru nevniliga eisini ónøgdir við, at millum andstøðufólkini eru tjetjenar og aðrir víðgongdir muslimar, ið mótarbeiða Ruslandi. Kelda NTB og Telegraph